# Tíggju til toppin

**Her lata vit oddafiskarnar í seks politiskum flokkum fáa orðið eina seinastu ferð í blaðnum, áðrenn valdyrnar lata upp**

FORMENNININR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Valstríð verður ført á øllum frontum. Líka frá smáa persónliga sambandinum á gøtuni, í telefonini, í heimunum til breiða propaganda í fjølmiðlum, á húsaveggjum og á valfundum.

Og valstríðið er í hæddini í hesi løtu, og talan er bara um tímar, sum eru eftir at reka í.

Fólk skulu nú seta sínar krossir við kosna valevnið, og tá er eingin vegur aftur. Í øllum førum ikki fyrr enn við næsta val, sum verður um fýra ár – ella kanska tvey.

Lyftini eru mong, summi øðrvísi enn onnur, summi bara ov langt úti, og summi uttan iva verulig og erlig.

Her lata vit oddafiskarnar í seks politiskum flokkum fáa orðið eina seinastu ferð í teigunum her á blaðnum, áðrenn valdyrnar lata upp.

Hetta eru fólk, sum hava verið nógv frammi seinastu vikurnar, og tað er uttan iva millum hesi fólkini, at næsti leiðarin í landinum skal finnast.

Vit hava sett toppunum í teimum ymisku flokkunum 10 spurningar. Summir eru á politisku bógvin, meðan aðrir eru meira persónligir.

Við hesum ynskja vit øllum eitt gott løgtingsval.

## Konan fann mær nýtt slips



**Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum**

*Hvat er tað besta við, at tað er val?*
- Stemningur undan valinum. Í valstríðnum er tað hugaligt at uppliva, at fólk veruliga arbeiða fyri eini felags søk.

*Hvussu nógvar atkvøður roknar tú við at fáa?*
- Tað veit eg ikki. Eg royni sum frægast, men eg vil ikki gita nakað. Tað er blivið enn verri at meta um hetta, nú vit hava fingið eitt valdømi.

*Hvussu nógvar tinglimir fær flokkurin?*
- Um vit fáa sama tal av tinglimum, sum vit hava nú, so eri eg nøgdur. Fáa vit fleiri, so hevði tað verið fantastiskt.

*Hvat etur tú valkvøldið?*
- Eg havi ongar traditiónir valkvøldið. Vit fáa smyrjibreyð, føroyskan mat ella okkurt annað.

*Hvat bjóðar tú, um tú verður afturvaldur?*
- Hurðin hjá mær er altíð opin, og tey, sum koma á vitjan, skulu ikki fara svang ella tyst út aftur.

*Hevur tú keypt tær klæði til valstríðið?*
- Konan hevur funnið mær eitt nýtt slips, og fleiri hava viðmerkt, hvussu pent slipsið er.

*Hevur tú verið hjá frisør?*
- Ja, eg plagi at fáa systur mína, sum er frisør, at klippa mær.

*Hvør er tað stuttligasta valevnið?*
- Nógv av valevnunum eru stuttligt – duga væl at práta og skemta – men eg vil ikki nevna nakran ávísan.

*Hvussu nógvar pengar brúkar tú upp á valstríðið?*
- Umleið 20.000 krónur.

*Hvør verður løgmaður eftir valið?*
- Valúrslitið fær sjálvandi ávirkan á tað, og tað er vónleyst at gita.

## Eg eri besta boðið upp á løgmann



**Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum**

*Hvat er tað besta við, at tað er val?*
- Eitt valstríð fær adrenalinið at koyra runt hjá okkum øllum. Vit koma hvørjum meira við, sum eru uppstillað, og vit koma út til lokalfeløgini og vanligu limirnar í einum felags stríði. Annars dámar mær sera væl lokalu valfundirnir, tá nakað av tí gamla stemninginum frá fyrr er.

*Hvussu nógvar atkvøður roknar tú við at fáa?*
- Eg vóni at verða valdur, men eg havi einki boð uppá atkvøðutal.

*Hvussu nógvar tinglimir fær flokkurin?*
- Hóast vánaligar veljarakanningar, so vóni eg, at vit fáa sjey ella kanska átta.

*Hvat etur tú valkvøldið?*
- Eg havi sjáldan tíð at eta eitt valkvøld og als ikki bindindi til at gera tað. Fái mær ivaleyst ein betri bita, tá úrslitini eru komin, og viðmerkingarnar eru gjørdar.

*Hvat bjóðar tú, um tú verður afturvaldur?*
- Tey, sum koma inn á gólvið, fáa sjálvandi bæði ein góðan bita og okkurt at sløkkja tostan við. Tað fáa tey forrestin eisini, um eg ikki skuldi verið valdur. Hetta eru ofta stuðlar, sum offra nógva dýrmetta tíð fyri at hjálpa til.

*Hevur tú keypt tær klæði til valstríðið?*
- Ja, ein nýggja klæðning í farnu viku.

*Hevur tú verið hjá frisør?*
- Klipti mær á Tvøroyri í farnu viku. Ikki bara tí tað er val, men eg var vorðin nakað loðin.

*Hvør er tað stuttligasta valevnið?*
- Kári á Rógvi.

*Hvussu nógvar pengar brúkar tú upp á valstríðið?*
- Undir 5.000 krónur.

*Hvør verður løgmaður eftir valið?*
- Nú hugsi eg ikki um meg sjálvan, men um Føroyaland, og tá er Jóannes Eidesgaard besta boðið.

## Ynski mær atkvøður í føðingardagsgávu



**Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum**

*Hvat er tað besta við, at tað er val?*
- Valstemningurin og spenningurin. Men eg kann leggja afturat, tá ið eg eri í valstríði, so gleði eg meg eisini til, at tað er yvirstaðið, tí trýstið er sera stórt.

*Hvussu nógvar atkvøður roknar tú við at fáa?*
- Tað er vónleyst at siga. Men eg rokni við, at tað skulu einar 400 ella 450 atkvøður til fyri at sleppa inn á Fólkaflokslistanum, so tað vóni eg at fáa.

*Hvussu nógvar tinglimir fær flokkurin?*
- Útlitini eru, at vit fáa seks tinglimir, men vit hava fyrr gjørt ein góðan endaspurt, so eg vóni, at vit náa tann sjeynda tinglimin.

*Hvat etur tú valkvøldið?*
- Í Danmark sær mann, at floksformenn sita og fáa sær at eta valdagin. Í Føroyum hava formenninir ikki stundir til tað – vit reka.

*Hvat bjóðar tú, um tú verður afturvaldur?*
- Eg hevði føðingardag hósdagin, og tá hevði eg ikki stundir at halda hann, so valkvøldið bjóða vit smyrjibreyð, og so kann eg halda føðingardagin tá eisini. Og eg havi sagt við fólk, at eg ynski mær atkvøður í føðingardagsgávu.

*Hevur tú keypt tær klæði til valstríðið?*
- Eg havi keypt mær nýggjan klæðning.

*Hevur tú verið hjá frisør?*
- Eg klipti mær beint fyri jól.

*Hvør er tað stuttligasta valevnið?*
- Eg veit ikki, hvør er tann stuttligasti av øllum valevnunum, men eg eri ofta í kjaki við formenninar, og har haldi eg, at Kári Højgaard er stuttligur við síni sjálvsironi.

*Hvussu nógvar pengar brúkar tú upp á valstríðið?*
- Eg rokni við, at eg brúki millum 20 og 30.000 krónur.

*Hvør verður løgmaður eftir valið?*
- Jóannes Eidesgaard heldur í fyrstu syftu fram sum løgmaður, men annars stendur tað nokk so opið. Eg rokni við, at vit byrja við samráðingum millum verandi samgonguflokkar, og so fáa vit at síggja, um tað røkkur á mál.